

## Golf-pennar

Kanska er tað eitt gott gávuhugskot, sum nú fæst á gadgets.dk. Snøgga golf-taskan úr leðuri er einans 19 cm til hæddar, men í innihaldinum finna millum annað tríggjar pennar, sum allir hava skap av golf-jarni. Eru fleiri við áhuga fyri ítróttini á arbeiðsplássinum, kann talan í øllum førum verða um góða mandulgávu.

## Lægsti oljuprísurin í 17 ár

Lýggja veðrið í USA hevur av álvara givið úrslit í lægri oljuprísum. Fyri stuttum varð annars spátt, at talan skuldi gerast um ein metkaldan vetur, og hetta trýsti prísirnar uppeftir. Ætlaða bunkringin av olju verður tó nú av ongum, og tá OPEC enn ikki hevur víst tekin um at skerja framleiðsluna, soleiðis sum tað annars hevur ljóðað, er prísurin lækkaður nógv. Somikið nógv, at keypsskálin í New York í gjár kundi boða frá, at talan var um lægsta oljuprísin í samfull 17 ár.



*Tað krevur skynsemi og nærlagni tá slíkt skal gerast. Her eru allir tríggir ídnir í ferð við at festa ta einu av teimum íalt 230 plátunum*

*"Vit byrjaðu at arbeiða her í gjár. Men sum tú sært, her er nógv eftir!"*

## Kavarudding og viðlíkahald

At vera liðformaður hjá Landsverki merkir at hesin hevur ábyrgd fyri ávísum arbeiðum fyri vegadeildina í norðara parti av Eysturoynni.

Í starvi sínum sum liðformaður eru tað serliga tvey høvuðsøkir og høvuðsarbeiðir sum Eyðbjørn og hansara fólk er við í: Viðlíkahald um summarið og kavarudding um veturin.

Men sum nevnt aðrastaðni á síðuni eru teir eisini á øðrum støðum og arbeiða - í hesum føri beint hinumegin brúnna um Streymin.

– Ja, vit hjálpa ofta í øðrum økjum, um brúk er fyri tí. Beint nú eru vit í Streymoynni, og onkutíð eru vit aðrastaðni í Eysturoynni og arbeiða.

– Og so plaga teir at hjálpa okkum, um tað er neyðugt, sigur Eyðbjørn.

árskiftið.

Tað var júst hetta við bilverjuni - og teirri harav fylgjandi ferðslutrygdini - sum teir tríggir tóku st við henda morgunin, ið Sosialurin koyrdi framvið.

### 229 plátur aftrat

Tá bilverja verður sett upp er avgjørt neyðugt at her verður farið fram nágreiniliga og við skynsemi.

Teir stóru stabbarnir verða fyrst settir niður, og síðani verða tær fýra metrar longu pláturnar í bilverjuni festar í hvønn einstakan stabba.

Í hvørji plátu er eitt hol, og gjøgnum hetta verður síðani ein stórur møttrikkur festur, soleiðis at hetta kann halda, um illa vildi til hjá onkrum bilførara.

Líkt er til, at teir tríggir - Eyðbjørn, Poul Juul og Ellindur - hava royndt hetta áður og tí vita teir, hvat tað vil siga at arbeiða sum eitt lið.

Tað sær einfalt út fyri tann óroynda, men tað krevur neyvleika og handamegi at seta allar hesar pláturnar upp. Ein løtu seinni er tann fyrsta plátan fest á stabban, og nú verður farið eftir tí næstu, tí hon skal festast útyvir.

Hetta var so tann fyrsta í hesum umfarinum. Nú eru bert 229 aðrar eftir, inntil komið er á mál við Streymnes!

- Tá hetta arbeiðið er liðugt fara vit yvirum aftur brúnna. Har er alt okkurt arbeiði, sum bíðar eftir okkum, sigur Eyðbjørn.

### Vaska skelti

Eitt av teimum stóru arbeiðunum, sum hoyra undir arbeiðsøkið hjá Eyðbjørn og hansara monnum, er Norðskálatunnilin.

Her er eisini framt eitt stórt viðlíkahaldsarbeiði tey seinastu mongu árini, fyri líkasum at dagføra hann til tað, sum verður kravt av slíkum tunlum í dag.

Umfram hetta stóra arbeiðið so hevur tunnilin eisini tørv á regluligum viðlíkahaldi. Og tað hoyrir somuleiðis undir arbeiðsøkið hjá Eyðbjørn.

Millum hetta arbeiðið er reglulig vasking av skeltunum inni í tunlinum, soleiðis at bilarnir altíð kunnu síggja endurskinini framvið vegginum klárt - og reint!

- Tað dálkar heldur meiri nú, tí tað er so stutt síðani at tunnilin varð asfalteraður.

- So tað hevur verið nógv vasking í seinastuni, slær Eyðbjørn fast.

### Hálka og salt

Nú veturin er komin eru tað líkindini hjá teimum koyrandi sum standa ovarlaga á skránni.

Tá vit tosaðu við Eyðbjørn aftur fyrrapartin í morgun vóru teir framvegis í arbeiðinum við bilverjuni til Streymnesar.

Men fyri fáum døgum síðani frættist kortini frá kava. So nógvur kavi var niðurkomin, at koyrandi varð ikki av Eiði til Gjáar. Heitt varð ístaðin á bilførarar um at koyra gjøgnum Funningsbotn og Funning um teir ætlaðu sær tann vegin.

Frammanundan seinasta vikuskiftinum høvdu teir ikki grivið nakrastaðni í vetur, men bert saltað á fleiri støðum.

Hetta arbeiðið var farið fram á teimum støðum, sum ofta verða nevnd, tá koyrilíkindini verða lisin í útvarpinum: Tunnilsvegnum við Norðskála, um Eiðisskarð og á Gjáarvegnum.

- Her kann ein altíð rokna við hálku. Ja, eg kann minnast at í fyrraári saltaðu vit heilt fram til juni mánað, sigur Eyðbjørn við einum brosi.